# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar í turnusstørv

Farið verður undir eina nýggja áhugaverda skipan við turnusstørvum fyri sjúkrarøktarfrøðingar í heyst. Skipanin umfatar kir./ bráð., psyk og med. deplarnar. Størvini verða býtt í 3 modulir, har hvørt modul er 6 mdr.

Sum eina roynd verða 3 verandi sjúkrarøktarfrøðingastørv skipað sum turnusstørv. Hesi eru leys at søkja til setan 1. oktober 2008 til og við 31. mars 2010 á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum. Viðkomandi verður settur á Landssjúkrahúsinum við tænastu ½ ár á hvørjum depli.

**Endamál**
- At førleikamenna sjúkrarøktarfrøðingar í klinikkini innan psykiatriska, kirurgiska/akutta og medisinska sjúkrarøkt og viðgerð
- At sjúkrarøktarfrøðingar fáa víðari upplæring og økta vitan um ymisku serøkini og sostatt størri kunnleika til yrkið sum profession
- At tann einstaki sjúkrarøktarfrøðingurin hevur betur møguleika at taka støðu til val av sergrein innan røktina

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
At veita røkt og viðgerð til sjúklingar á avvarðandi deplum

**Vit bjóða**
- skipaða innleiðslu og upplæring
- skipaða útbúgvingarætlan
- møguleika fyri námsvitjan á øðrum deildum/deplum
- áhugavert og avbjóðandi starv
- dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- ávirkan á fakliga menning

**Vit ynskja, at tú ert áhugað/ur í**
- at menna sjúkrarøktina á deildini saman við kompetentum starvsfólkum
- at virka fyri einum góðum arbeiðsumhvørvi, sjúkrarøktarfakliga og tvørfakliga

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fleksibilitetur
- telduførleika á brúkarastøði

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 304500 og venda sær til leiðandi sjúkrarøktarfrøðing:
- Nainu Túgvustein á Skurðdeplinum, lokal 5102, lsnaitu@ls.fo
- Ásu Poulsen á Medisinska deplinum, lokal 6102, lsasapo@ls.fo
- Bergit Weihe á Psykiatriska deplinum, lokal 4102, lsberwe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 18. juni 2008**

## Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna

Eitt fulltíðarvikariat sum ljósmóðir í Ljósmøðratænastuni er leyst at søkja til setan 1. august 2008 til og við 30. juni 2009.

Starvið umfatar alt virkisøkið hjá Ljósmøðratænastuni, t.e. viðgongu, føðing og barsil.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- royndir innan viðgongu, føðing og barsilstíð

**Vit ynskja eina ljósmóðir, ið**
- er eldhugað/ur, áræðin og jalig/ur
- hevur góð samskifti- og samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðugt

Nærri fæst at vita við at venda sær til Eyðfríð L. Jacobsen, leiðandi ljósmóðir, tlf. 304500, lokal 5301, lseydja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 4. juli 2008**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Summarferiustarv í Kommunulæknatænastuni**
Umsóknarfreistin er 6. juni 2008 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Med. depilin**
Umsóknarfreistin er 16. juni 2008 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 16. juni 2008 kl. 12.00

**Ljósmóðir**
Umsóknarfreistin er 4. juli 2008

**Yvirlækni til Medisinsku deild**
Umsóknarfreistin er 16. juni 2008
Sí meira á www.laegejob.dk

**Fasa III útbúgving í intern medisin**
Umsóknarfreistin er 1. august 2008
Sí meira á www.laegejob.dk

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo


**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**




Til vår trippel reketråler, M/Tr. Remøy Viking, søker vi etter erfaren:

**2. STYRMANN / TRÅLBAS**

**for tiltredelse i midten av juni.**

Henv:
**Remøy Sea Viking AS · 6090 Fosnavåg**
**Tlf.: 70 08 08 50 · Faks: 70 08 08 60**
**merete@remoy-sea.no**

SÓKT VERÐUR EFTIR BUSSFØRARA

AT KOYRA Á LEIÐ 101 OG 300.
VIT KUNNU BJÓÐA GÓÐA LØN
OG NÓGVA FRÍTÍÐ.

ÁHUGAÐI KUNNU RINGJA 58 90 11